VIÐMERKINGAR

# Tenninar úr andstøðuni

Bjarni Djurholm



Panikkur í, nú samgongan samtykti yvirtøkulógina, sum er identisk við ætlanirnar hjá undanfarnu samgongu, tá kallað 7-míla fet móti fullveldinum.

Yvirtøkulógin er avgreidd. Løgtingið hevur endaliga samtykt sáttmálagerð millum Føroyar og Danmark, har Føroya Løgting kann gera av, at øll málsøki, undantikið tey, sum eru karmar um ríkiseindina, kunnu yvirtakast við teirri fylgju, at Løgtingið rindar fyri tær útreiðslur, ið fylgja við teimum.

Sáttmálagerðin ger greitt, at tekur Føroya fólk við fólkaatkvøðu avgerð um, at Føroyar skulu vera fullveldisríki, koma málsøkini, sum eru karmar um ríkiseindina, undir føroyskt málsræði.

Sáttmálagerðin ger eisini greitt, at Føroya fólk varðveitir sín viðføðda, ómissandi og áframhaldandi sjálvsavgerðarrætt á øllum økjum, tað verið seg í innanlendis viðurskiftum eins væl og í altjóða høpi sambært altjóðarætti.

Fyrstu ferð í mansaldrar kundi Løgtingið taka støðu til uppskot, sum er grundarlag undir tjóðarsemju tvørtur um floksmørk. Men nei. Andstøðan sveik hóast yvirtøkulógin er identisk við ætlanina hjá undanfarnu samgongu. Ja, í 2002 var hon enntá skýrd 7-míla fet móti fullveldinum.

## Produsera mytu

Í frustratión um, at viðurskiftini millum Føroyar og Danmark nú normaliserast kom panikkur í andstøðuna, har tenninar ein fyri og onnur vórðu trektar út. Akademiska gluggapyntið avdúkað. Tí var umráðandi hjá flokkunum at halda fast við øsingina. At grugga. At pástanda falsan og produsera mytu um svikabrøgd, sum flokkarnir kunnu liva av komandi valskeiðini.

## Lítlan sóma

At andstøðan undir aðru viðgerð í Løgtinginum harumframt blokeraði demokratisku atkvøðugreiðsluni av yvirtøkulógini, tí hon ikki fekk sín vilja, var avdúkandi. Minti ikki sørt um atburðin hjá totaliterum flokkum í fyrru helvt í farnu øld. Ódemokratiskur hugburður, sum á ongan hátt kann góðtakast, og sum er fólkaræðinum til lítlan sóma.

Undir viðgerðini av yvirtøkulógini viðgjørdi andstøðan danska ríkislógartilmælið við páhaldi um, at sjálvsavgerðarættur okkara er fokin. Hetta er sjálvsagt ikki so. Er tað bera grugg.

Í uppriti um m.a. yvirtøkulógina frá fremsta løgfrøðingi okkara í altjóðarætti verður gjørt púra greitt, at "Tað sær ikki út til at vera nakað í viðmerkingunum, sum ger seg inn á sjálvsavgerðarrættin hjá føroysku tjóðini. At tað í donsku viðmerkingunum verður víst til løgfrøðiligar veruleikar, sum at grundlógin er í gildi í Føroyum, kann ikki metast at hava nakra ávirkan í hesum sambandi".

Víðari verður sagt, at "Tað er einki í sjálvstýrisgongdini í Føroyum, sum kann metast at vera avlutting avhesum rætti (sjálvsavgerðarrætturin, red.), heldur ikki viðmerkingarnar til tey uppskot, ið eru til viðgerðar í hesum døgum".

Her er eingin ivi.

Tí sum sami løgfrøðingur sigur: "Uppskotið til yvirtøkulógina er ein víttgangandi øking av møguleikunum at yvirtaka sambært heimastýrislógini og hevur sostatt við sær munandi víðkaðar heimildir hjá føroysku myndugleikunum at yvirtaka málsøki".

## Forvirra

Í tingviðgerðina nýtti andstøðan eisini notatið frá Løgtingsskrivstovuni at forvirra yvirtøkulógina. Men har var heldur einki at fara eftir. Talan var ikki um eitt burturvísingarnotat, men bert um notat vísandi til eftiransingararbeiðið hjá Løgtinginum. Yvirtøkulógin er jú politikkur. Løgtingið ger tað sum Løgtingið vil.

Alt hetta veit andstøðan, men í fornermilsi varð alt gjørt fyri at forða størsta frambrotinum á sjálvsstýrisleið farnu mansaldrarnar. Ístaðin fyri at vera partar av tjóðarsemju, so avdúkaði andstøðan bera ómegd.

Hanar halda, at gala teir ikki á morgni so rísir sólin ikki. Soleiðis tykjast summi halda, at tey eru ein gáva til fólkið. At tey umboða allan sannleikan. Andstøðan burdi sæð skriftina á vegginum. Tað ber saktans til at reka politikk uttan teirra luttøku.

# Bíðilistarnir kunnu styttast uttan stórvegis eykakostnað

Kaj Leo Johannesen
*Sambandsflokkurin*



Leygardagin 7. mai hevði Útvarp Føroya samrøðu við Hera Ellingsgaard, umsjónarmann á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Hann greiddi frá, at tað ber til at stytta bíðilistarnar í føroyska sjúkrahúsverkinum munandi eftir heilt stuttari tíð, og at hetta kann gerast uttan stórvegis eykakostnað.

Heri Ellingsgaard vísti á, at starvsfólkaskipanin á sjúkrahúsunum er soleiðis háttað, at fólk sita klár og bíða eftir at verða tilkallað, um nakað serligt skuldi verið á vási, og hesi fólkini fáa, sum rímiligt er, løn fyri at vera tøk. Samtíðis eru skurðstovurnar tómar meðan bíðilistarnir fyri at sleppa inn á skurðstovurnar eru langir. Hann mælti tí til, at sjúkrahúsini í eitt avmarkað tíðarskeið, tóku skurðstovurnar í brúk nakrar tímar leygardag. Tað hevði ikki havt stórvegis eyka útreiðslur við sær, tí fólkini eru lønt frammanundan, men bíðilistarnir kundu á henda hátt verið styttir munandi.

Sambandsflokkurin hevur mælt til, at politiski myndugleikin setir sær sum mál at fáa bíðilistarnar til sjúkraviðgerð í føroyska sjúkrahúsverkinum styttar. Vit hava í tí sambandi víst á, at stórur partur av útreiðslunum verður vunnin innaftur, við tað at fólk verða styttri frá arbeiði vegna sjúku. Men er tað so sum umsjónarmaðurin á Klaksvíkar Sjúkrahúsi sigur, at bíðilistarnir kunnu styttast uttan stórvegis eykakostnað, so eru uppaftur fleiri orsøkir til at seta skipanina í verk sum skjótast.

Sitandi danska stjórnin hevur síðani hon tók við, fyri trimum árum síðani, arbeitt miðvíst við at stytta bíðilistarnar til sjúkraviðgerð í Danmark. Hetta hevur verið ein sólskinssøga. Fleiri eru komin í viðgerð, bíðilistarnir eru styttir og sjúklingarnir eru nøgdir.

Hví gera vit ikki tað sama í Føroyum - serliga um ein partur kann gerast uttan stórvegis eykakostnað?

Sambandsflokkurin ætlar at stríðast fyri, at bíðilistarnir til sjúkraviðgerð í Føroyum innan 3 - 4 ár verða styttir niður til í mesta lagi tveir mánaðar.

# Jógvan við Keldu, hví so illur?

HUXA-Fólkafloksungdómur

Tað kemur heilt klárt fram í viðmerking í Sosialinum hin 11/5-2005, at Jógvan við Keldu er harmur um ta ljótu viðferð, sum hann sigur at "kraddararnir," sum hann sjálvur kallar teir, hava fingið frá serkønum fólki, Tjóðveldisflokkinum og Fólkafloksungdómi.

Fyri tað fyrsta, á hvønn hátt lítisvirða okkara vælútbúnu okkara "falliterandi" høvuðsvinnu? Jógvan við Keldu skrivar - (atlit er ikki tikið fyri villum í siteringunum í viðmerkingum hjá Jógvan við Keldu í Sosialurin 11/5-2005, sum standa í kursiv):

"Ikki er ov nógv sagt, at tosið ídag líkist prátinum tá, burtursæð frá, at ídag er margfeldi av fastløntum droymarum bæði í politikki, fólki á almennum og hálvalmennum stovnum og tey, sum liva av studningi úr landskassanum, økt"

Hvussu ber tað til, at margfeldi av omanfyrinevndu størvum er økt, tá ið Jógvan við Keldu og Fólkaflokkurin hava sitið við valdið tey seinastu níggju árini? Hvar eru privatiseringarnar av teimum "hálvalmennu størvunum" hjá Jógvani við Keldu, og hvar er borgarligi politikkurin hjá Fólkaflokkinum vorðin av? Í valskránni hjá Fólkaflokkinum stendur

## Almenni sektorurin betri og bíligari

"Fyri at almenni parturin av samfelagnum kann koma í betri javnvág við vinnuliga partin, má bygnaðurin í landsumsitingini gerast meiri brúkaravinaligur og bíligari at reka. Almennar fyritøkur — tá tað er til fyrimun fyri landsbúskapin — verða einskildar so við og við eftir fastari ætlan, so tað tænir føroyskum áhugamálum best."

Hví er almenni sektorurin so vaksin síðstu árini, tá ið Jógvan við Keldu sjálvur hevur sitið í samgongu í níggju ár? Hví kann landsstýrismaðurin ikki halda seg til evnið um rækjustuðul? Er Jógvan við Keldu tómur fyri fornuftigari argumentatión?

"Á politiska pallinum, hevur Tjóðveldisflokkurin verið tann mest ídni at lopið á okkara fiskivinnu, tá talan í ávísum førum hevur verið alment um at lyfta nakað uppundir, fyri ávísir partar ikki skulu fara fyri bakka. Nú hevur Tjóðveldisflokkurin altíð staðið fyri øllum ella ongum, svørtum ella hvítum, og nú sær tað út til at fólkafloksungdómur tekur væl undir."

Hvørji ítøkilig dømi hevur Jógvan við Keldu, at Fólkafloksungdómur stendur fyri svørtum ella hvítum, øllum ella ongum? À hvørjum grundarlagi vil Jógvan við Keldu undirbyggja sín omanfyristandandi pástand? Er tað bara tí, at vit í lesarabrævi vilja vísa flokkinum á ta liberalu loysnina, ið byggir á skynsemi?

Tað, sum undrar okkum stórvegis er, at landsstýrismaðurin við Innlendismálum vísir á fakfeløg og einstaklingar úr Klaksvík í 1993, tá ið hann sjálvur sat sum borgarstjóri, sum kláraðu seg uttan almenna uppíblanding, tá ið alt hongdi á gomlum naglum. Vil tað siga, at, neyðloysnin úr Norðoyggjum, Jógvan við Keldu, heldur, at almennur stuðul er rætti hugburður at vísa mótvegis okkara fiskivinnu?

Nei, Jógvan við Keldu og aðrir, sum vilja geva rakstarstuðul. Meldið tykkum í annan flokk, tí Fólkaflokkurin er ikki ein flokkur fyri skápskommunistar. Takið annað skinn um bak og haldið tykkum til tað, ið reiðararnir sjálvir ynskja, nevniliga liberalan vinnulívspolitikk. Ein millión um árið til hvørt skip, er ikki eingongd nokk til eina nýggja koyggju.

Eitt er at vera ósamdur, sum vit eru í málinum um rakstarstudning til rækjuvinnuna, við leistinum hjá samgonguni, men at leika soleiðis í, sum Jógvan við Keldu ger, førir okkum ongan veg. Hann má sum landsstýrismaður kunna taka kritik og vera undangongumaður, tá talan gerst um diplomati og konsensus. Stuðulin til rækjuvinnuna er eitt prinsippielt mál, tí Fólkaflokkurin í stevnuskánni er ímóti almennum stuðuli. Teir siga m.a. beinleiðis í stevnuskránni:

"Fiskivinnan í tryggar karmar: Høvuðsvinnan skal mest møguligt hvíla í sær sjálvari uttan almennan stuðul. Fiskastovnarnir skulu gagnnýtast á vinnuligum grundarlag undir skynsomum fiskifrøðiligum heildaratliti. Útbúgving og gransking skulu menna vinnuna og økja úrtøkuna við somu veiðinøgd.

## Rækjuvinnan skal fáa betri karmar at vinna seg uppaftur

Hendan er ein av mongu orsøkunum til, at bæði Fólka- og Sambandsflokkurin eiga at slóða fyri, liberalur vinnulívspolitikkur aftur verður settur á dagsskránna!

Við vón um, at borgarligu flokkarnir fara at vísa liberala sinnið og ikki niðurgera teir borgarligu veljarnir í málinum um rakstarstuðul til rækjuvinnuna.